**HEIMARØKTIN OG SERFORSORGIN**
*HEIMARØKTIN*

## Roknskaparfólk til Røktarheimið á Mørkini í Streymnesi

Søkt verður eftir roknskaparfólki til Røktarheimið á Mørkini at byrja skjótast tilber

Røktarheimið á Mørkini er partur av Heimarøktini øki 2 og pláss er fyri 32 búfólkum sum koma at búleikast í 4 eindum.

**Arbeiðsuppgávur:**
- At føra roknskaparhaldið fyri stovnin
- Saman við økisleiðaranum at leggja fíggjarætlanir
- Regluliga kunna um fíggjarstøðuna hjá stovninum
- Skipa fyri innanhýsis fíggjarstýring og dagføra hesar í mun til inntøkur og útreiðslur

Umframt roknskaparuppgávur kemur arbeiðið eisini at fevna um aðrar fyrisitingarligar uppgávur so sum:
- Journal
- Skrivari hjá leiðaranum
- Lønaravgreiðsla
- Telefonavgreiðsla, heinta post o.a

**Fyrimunur er at tú hevur:**
- Viðkomandi útbúgving
- Góðan telduførleika
- Kunnleika til FSL bókhaldsskipan landsins
- Ert fleksibul og hevur evni at læra nýtt
- Royndir innan almenna fyrisiting
- Dugir at arbeiða sjálvstøðugt
- Dugir væl at samstarva og samskifta við onnur
- Tolir møguligar bygnaðarbroytingar

**Vit kunnu bjóða:**
- Eitt nýtt starv har tú hevur góðar møguleikar til at brúka tíni skapandi og ígongdsetandi evnir
- Eitt gott umhvørvi har hvør einstakur kennir seg væl
- Góða innleiðslu

Setanarøkið er Heimarøktin og Serforsorgin

**Lønar- og setanartreytir**
Starvið verður sett sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi yrkisfelag.

Nærri upplýsingar um starvið fæst við at venda sær til økisleiðaran Sonju Klein, á tlf. 333249/282249

**Umsókn:**
Umsókn við avriti av prógvi og møguligum viðmælum v.m. skal sendast til:

**Heimarøktin Vágar/Norðstreym**
Økisskrivstovan
Stílað: Sonja Klein, økisleiðari
370 Miðvágur

**Umsóknarfreist: 26. mai 2006 kl. 15.00**

Internet Sosialurin
www.sosialurin.fo

**Eiðis skúli**
Kolsvegur 8 · FO-470 Eiði · Tlf. 423579
Fax 423480 · e-mail·skulin@post.olivant.fo
heimasíða: www.eidi.fo/skulin/

## Eiðis skúli

**Søkt verður eftir lærarum og stuðulsfóli til Eiðis skúla**

- 1 fast fulltíðarstarv. Starvið verður sett sum sáttmálasett starv, uttan so, at tann, ið settur verður, er tænastumannasettur lærari frammanundan.
- 1 tíðaravmarkað starv skúlaárið 2006/2007 vegna avlopstímar. Starvið er uml. 18 tímar um vikuna. Endaliga tímatalið verður fastsett í september.
- 1 tíðaravmarkað starv fyri lærara í barnsburðarfarloyvi frá 4. septembur 2006 og fyribils til 18. mars 2007. Starvið er fulltíðarstarv.
- Stuðulsfólk 20 tímar um vikuna. Starvið er lønt eftir sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Pedagogfelagið.

**Tey, ið sett verða skulu:**
- undir ábyrgd leiðslunnar taka lut í dagliga arbeiði skúlans
- duga at samstarva
- verða fús at taka á seg tær uppgávur, ið eru í skúlanum
- vera við til áhaldandi at menna skúlan

**Førleikakrøv**
Læraraútbúgving

Lærarastørvini verða lønt sambært avtalu millum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálaráðið í lønarflokkunum 18.1 - 27.4.

Meira kann fáast at vita um størvini frá fyrstalæraranum Tom Joensen á tel. 423579 ella 229045.

Umsóknir við c.v. og avritum av prógvum skulu vera fyrstalæraranum í hendi í seinasta lagi týsdagin 30. mai kl. 15.00.

**Eiðis skúli**
**Postrúm 29**
**470 Eiði**

*Eiðis skúli hevur undirvísing í 1. – 7. árgangi. Skúlin er væl útgjørdur við serstovum, lærarahølum og ítróttahøll og hevur góðar umstøður til næmingar og lærarar. Komandi skúlaár verða 8 lærarar og 72 næmingar í Eiðis skúla.*

## Arbeiði í Danmark

Søkt verður eftir monnum við royndum innan betongarbeiði og jarnbinding. Arbeiðsøkið: Amager/Sjælland.

**Palja Ejendomservice**
**palja@ofir.dk**
**Tlf. 0045 22961852**

## Ung lesandi genta

við einum barni søkir íbúð í Keypmannahavn til leigu ella framleigu. Alt hevur áhuga.

**Tlf. 0045 60748574**

## Økispedagogur til Dagrøktarskipanina í Runavíkar kommunu

Søkt verður eftir pedagogi í farloyvisstarv, 30 tímar um vikuna frá 1. juni 2006 til 1. juni 2007.

**Um Dagrøktarskipanina**
Dagrøktin er ein kommunal skipan undir Runavíkar kommunu. Dagrøktin er normerað til 90 børn.
Í dagrøktini starvast 21 dagrøktarar, 1 spælistovufólk og ein leiðari.
Spælistova er knýtt at dagrøktini.

**Arbeiðuppgávurnar eru m.a.**
- at vitja dagrøktarheim, veita ráðgeving og hava eftirlit
- at virka fyri at starvsfólk trívast og mennast
- at tryggja námsfrøðiliga tilboðið eftir tørvinum hjá tí einstaka barninum og teimum treytum, sum skipanin virkar undir
- skrivstovuarbeiði

**Vit leita eftir fólki, ið**
- er útbúgvin pedagogur
- hevur góð samstarvsevni
- er nýhugsandi og ígongdsetandi
- kann arbeiða sjálvstøðugt

**Setanarviðurskifti**
Lønin er sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelagið

**Fleiri upplýsingar**
Nærri fæst at vita um starvið við at tosa við Jákup H. Foldbo sosialdeildarleiðara á tlf. 417000 ella Dagrøktarleiðaran á tlf. 448594 lok. 10

**Søk starvið**
Við at senda okkum eina umsókn í seinasta lagi mánadagin 29. mai 2006, kl. 12:00.

*Umsóknin skal sendast til:*




**Runavíkar Kommuna**
Sosiala deild
Heiðavegur 26
Postrúm 139
FO-600 Saltangará

FAROE Seafood

## Maskinmaður

Søkt verður eftir einum maskinmanni, at byrja sum skjótast.

Arbeiðstíðin er í samband við framleiðslu, arbeitt verður í tveimum vaktum.

Arbeiði umfatar viðlíkahald av maskinum o.a. fyrifallandi maskinarbeiði,

Nærri upplýsingar fáast við at venda sær til Remi á telefon 594220

Umsóknarfreistin er 1. juni.

**P/F Faroe Seafood, Vestmanna**
Postboks 118
FO-350 Vestmanna
Tlf. 355555 - Telefax 424755